


**Fráboðan um umhvørvis-góðkenning**

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 14. apríl 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 , grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Betongblandistøðina hjá Sp/f J + H í Leirvík**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**LEIGA SJÓNVARP!**

Vit leiga út sjónvørp í støddum frá 20 til 28", video og upptøkutól.
**Einki depositum!**




SISERO 351800

**Radioverkstaðið**
v/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1 • Hoyvík • 31 95 44 • 25 11 60

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

**Útleiguamboð**
**Skal tú brúka amboð í styttri tíð? Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**

**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!



Sosialurin 311820

**Skrivstovufólk**

**Avloysarastarv í 1 ár fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi**

Apoteksverkið søkir eftir einum skrivstovufólki til bókhaldið hálva tíð.
Starvið verður sett skjótast gjørligt, ella eftir nærri avtalu.

Bókhaldsdeildin er á Tjaldurs Apoteki í Tórshavn.

Starvið inniber m.a. hesar uppgávur
- Upprætting og viðlíkahald av ognarskrá
- Viðlíkahald av ognarum
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur:
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevnir

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jonnu Djurhuus, telefon 341127.

Umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu í seinasta lagi 7/5-2003 sendast til:

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
FO-110 Tórshavn

**Upplatingartíðir í summar**

Framsýningarnar hjá Føroya Fornminnissavni

**í Brekkutúni 6**
**og útisavnið Heima á Garði**

lata upp fyri summarið sunnudagin 18. mai og hava opið fram til sunnudagin 14. september.

| | |
|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | kl. 10 til 17 |
| Leygardag og sunnudag | kl. 14 til 17 |

**Føroya Fornminnissavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Arbeiðsfólk**

Søkt verður eftir arbeiðsfólki, til asfaltliðið hjá Tórshavnar Kommunu

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Snarskivuna á tlf: 315160.

SNARSKIVAN

**Felagið Agape**

**Nú fríggjakvøldið 2. mai kl. 20** undirvísir Mads Noer, familjuráðgevi og psykoterapeutur í missiónshúsinum í Leirvík.

Evni: »**At vera góður við seg sjálvan sum eitt ábyrgdarfult menniskja, skapað í Guds mynd. Um sjálvsvirði og sjálvsálit**«.

Innsavnan verður til arbeiðið.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

TOR SHIPPING

**Til sølu**

Trolbáturin »Gáshøvdi« er til sølu uttan fiskiloyvi og -rættindi.

Áhugað biðjast vinarliga venda sær til

**Tor Shipping**
Tlf. 35 85 31
E-mail: torship@post.olivant.fo




NR. 80 • TÝSDAGUR • 29. APRÍL 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

**Finalan**

Leygarkvøldið var finalan í Prix Føroyum hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Hatespeech
Déjá Vu
MC Hár
Gestir
Braquet
Makrel

28 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu. Síðani fingu fólk kring landið eisini møguleikan at siga sína hugsan.

Úrslitið var, at Gestir vunnu, Déjá Vu var nummar 2 og Makrel nummar 3.

# Hatespeech kvittar við Prixið



*- Prixið er ikki fyri okkum. Tað er gott at tað er liðugt nú, so vit fáa samlað okkara tankar um onnur projektir, sigur Jákup Pauli Gaard Olsen, sangari í Hatespeech*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Áskoðararnir stinkaðu. Meðan eg stóð á pallinum framman fyri teimum hugsaði eg hvat í verðini teir gjørdu har. Tað var feitari at spæla til ljóðroyndina, sigur ein sjúkur og skuffaður J.P., sangari í Hatespeech dagin eftir Prix finaluna**

HATESPEECH
*Rúnar Reistrup*

Tað var ein sjúkur bólkur, sum spældi fyrst á Prix finaluni. Heilsan bilaði hjá trimum av teimum fimm tónleikarunum, og tað setti sín dám á framførðsluna, halda teir sjálvir.

Men tað var tað eitt annað, sum eisini gjørdi.

- Tá eg kom út á pallin legði eg beinanvegin merki til, at har var alt steindeytt í salinum. Áskoðararnir stinkaðu. Har var eingin kjansur at vit kundu fáa lív í tey, sigur J.P., sum umframt at syngja, slapp at eta síni egnu orð, meðan hann stóð á pallinum.

- Eg havi altíð sagt, at tað ger ongan mun at spæla fyrst ella síðst, bara man spælir gott. Men tað passar ikki. Tað fann eg útav leygarkvøldið, meðan eg stóð á pallinum. Eg tók feil. Eg kundi líka væl, nei betur, staðið mitt á gólvinum og sungi fyri ongum. Tað var feitari at spæla til ljóðroyndina.

Karismatiski og bersøgni sangarin er ikki í iva um, at tað hevði passað Hatespeech betur at spælt seinni út á kvøldið, tá áhoyrarafjøldin var "upphitað".

- Um vit spældu sum nummar seks, hevði allur salurin kókað. Allur salurin uttan ein lítil fýrakantur har tú bara sást stjørnukastarar og reyðar troyggjur.

### Orkaðu einki

Hatespeech hevði eitt pallshow við neistaroki, konfetti og eldi og sum vanligt var framførðslan orkufull. Men ikki so orkufull sum ætlað.

- Vit orkaðu hvørki eitt ella annað. Vit vóru ein kempistór basilla á palli. Og vit duga væl at síggja, at vit ikki gjørdu tað so gott sum í Fuglafirði. Men so galið var tað altso heldur ikki. Eg meini, hvør ger okkum hatta eftir nakrantíð? At vit ikki so mikið sum komu víðari er ótrúligt, sigur J.P.

Tað vera neyvan Hatespeech, ið gera sær sjálvum framførsluna eftir á eini Prix finalu, tí sambært sangaranum, er bólkurin liðugur við Prix Føroyar.

- Prixið er ikki fyri okkum. Tað er gott at tað er liðugt nú, so vit fáa samlað okkara tankar um onnur projektir, sigur J.P. at enda.

## Meiri grót til Nibe

**Enn ein bólkur, sum er sprottin úr Grót-umhvørvinum í Gøtu, skal spæla í Nibe**

FESTIVALUR
*Eyðun Klakstein*

Umboðini fyri tónleikafestivalin í Nibe vóru komin til Føroya at kjósa sær ein bólk, sum skal spæla hjá teimum í summar.

Valið fall á vinnandi bólkin í Prixnum.

– Gestir hevur nakað av tí originaliteti, sum vit altíð leita eftir, sigur Preben Møller Madsen, sum er leiðari fyri Nibe Festivalin, ið verður hildin har norðuri í Jútlandi.

– Vit gleða okkum til at fáa Gestir til okkara festival, og teir skulu bara halda fram við at spæla, sum teir gjørdu í finaluna. Og eg ivist ikki í, at teir vera enn betri, tá ið teir fara at spæla í Nibe.

### Meira grót

Ein annar bólkur, sum hevur røtur í umhvørvinum kring Grót í Gøtu hevur tvær ferðir spælt í Nibe.

– Clickhaze hevur fingið ein heimavølli, og tað er í Nibe. Og eg eri keddur av, at tey ikki kunnu vera við í ár, tí fólk hava tikið sera væl ímóti teimum, og vit vildu fegin havt tey aftur, sigur Preben Møller Madsen, sum tó helt, at tað var meira ella minni tilvildarligt, at tað nú var ein bólkur sama øki og umhvørvi, sum skal spæla i Nibe hesaferð.

Festivalleiðarin hevði nógv góð orð at bera Prix Føroyum.

– Prix Føroyar kann ikki rættiliga samanberast við líknandi kappingar í Danmark, hóast tær eisini eru góðar. Prix Føroyar er nakað heilt serligt, segði hann.